# Tikin av bóli av Marius



















**Nú er bara at vóna, at Marius gevur okkurt út sum skjótast**

ASFALT
*Sveinur Dam*
*sveinur.dam@gmail.com*



*Marius ger seg kláran til framførsluna í Miðlahúsinum*

*Mynd: Rólant Waag Dam*

Marius tóku Miðlahúspallin eftir Stanley Samuelsen. Hóast konsertin var nakað seinkað, var hon verd at bíða eftir, tí sjálvdan havi eg verið so tikin á bóli.

Við eini super manning, ið einans telur Heðin Ziska Davidsen og Hans Marius Ziska úr upprunaligu manningini, var beinanvegin greitt, at talan fór at vera um kvalitet. Og teir skuffaðu avgjørt ikki, men byrjaðu beinanvegin at spreiða glaðar, lívligar tónar um rúmið. Hans Marius Ziska er ein super frontmaður, og við liðina á honum sat fyrrverandi Flux-felagi hansara, Sveinur Gaard Olsen og sang við, floytaði ella spældi xylophon.

### Sangsmiður av Guðs náði

Hetta var øðrvísi. Brandur Jacobsen spældi trummusett og nýtti ein trækassa sum trummu, Óli Olsen kryddaði ljóðmyndina við harmoniku, og Heðin Ziska hjálpti honum, við slide-guitara, ukulele og meira vanligum guitarum eisini. Og við Bjarka Meitil á bassinum høvdu hinir ein tryggan botn at byggja á.

Løgini vóru góð, huglagið positivt og ljóðmyndin øðrvísi enn nakað, eg havi hoyrt áður.

Hans Marius er ein sangsmiður av Guðs náði, og eg haldi, at hesin nýggi stílurin riggar betri til hansara sangir, enn tað gamla, ið var meir rokkut.

Stuttligt eisini, at hann hevur Svein G. Olsen við sum sangara, floytara og alt hitt, sum hinir ikki hava stundir til, tí hann riggar væl á pallinum, sum tann eitt sindur anonymi limurin, ið situr mitt fyri.

Eg vóni veruliga, at teir hava í hyggju at geva okkurt nýtt út, tí tað er synd, um tey, sum ið ikki vóru til konsertina, ikki sleppa at hoyra teir.

# Yvirdoyvdir Tinganest

**Vágasound er vágasound, men tað hevur verið betri enn leygarkvøldið í FUTT-teltinum, har Tinganest spældu nógvar av klassikarunum fyri eini minni fjøld av fólki**

ASFALT
*Sveinur Dam*
*sveinur.dam@gmail.com*

Jóan Jakku Guttesen og Magnus á Stongunum munnu vera millum teir, ið eiga flest føroyskar slagarar sínamillum, og tað var stak stuttligt at hoyra teir framførdar, soleiðis sum teir eiga at vera framførdir. Næstan soleiðis, í øllum førum. Ein trupulleiki í næstan øllum sangunum, var lead-guitarin, ið hevði tendens at yvirdoyva restina, samstundis sum hann gjørdi nakað nógv av í solounum, sum á gomlu Tinganest útgávunum vóru eyðkendar við at vera rættuliga fittar melodilinjur, spældar uttan alt ov nógv hóvasták og við nógvum rúmklangi. Soleiðis, sum einans Eivin Simonsen spældi tær. Keðiligt, tí restin av bólkinum spældi væl, og man skuldi ikki trúð, at teir báðir frontmenninir vóru komnir upp í árini, tí teir sungu sum fyrsta dagin, og trummuleikarin spældi eisini væl, uttan at gera ov nógv av.



*Magnus á Stongum og Jóan Jakku Guttesen eru frontfigurarnir í Tinganest*
*Mynd: Rólant Waag Dam*